# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

## Fer frá vegna sparingar til mentan

**Lars Wegendal, formaður í mentanarnevndini hjá Norðurlandaráðnum, hevur sagt sessin frá sær, tí hann góðtekur ikki sparingar innan mentanarøkið**


*Lars Wegendal á fundinum hjá Norðurlandaráðnum í Stavanger*

*Mynd: Johannes Jansson/norden.org*

MENTAN

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Ætlanin er at spara fimm prosent av játtanini til mentan hjá Norðurlandaráðnum, soleiðis at globaliseringin kann verða raðfest hægri. Tí leggur formaðurin í nevndini fyri útbúgving og mentan, Lars Wegendal, nú frá sær.

Stórar broytingar í fjør høvdu við sær, at meiri pengingur skuldi fara til verkætlanir og minni til umsiting.

- Hetta er syndarligt! Avgerðin at skava fimm prosent av játtanini til mentan, fyri at lata meiri til arbeiðið við globalisering, er í andsøgn við lyftini vit góvu teimum sum arbeiða við mentan í fjør. Eg kann ikki hyggja tey í eyguni aftaná hesa ráðagerð, sigur Lars Wegendal, sum er limur í sosialdemokratiska bólkinum í Norðurlandaráðnum.

Norðurlendsku stjórnarleiðararnir hava longu avrátt, at Norðurlond skulu gerast meiri sjónlig og kappingarfør í globalum sambandi. Til hetta endamál verða 60 mió. kr. tiknar úr vanliga rakstrinum í fíggjarætlanini fyri 2009, harímillum eisini fimm prosent frá mentanini. Eftir hvat ið skilst, er tað eisini í hesum sambandi at orðaskiftið um játtanina til Norðurlandahúsið í Føroyum hevur stungið seg upp.

Lars Vegendal heldur andsøgn verða millum at vilja raðfesta globalisering og at skerja játtanina til mentan.

Lars Vegendal, sum heldur fram sum vanligur limur í Norðurlandaráðnum, boðaði frá avgerð sínari á fundi hjá Norðurlandaráðnum í Stavanger týsdagin, skrivar Norden.org.




## Leiðari til deildina hjá Smyril Blue Water í Tórshavn

- Ert tú ein liðspælari?
- Dugir tú at skapa framburð og góð úrslit?
- Dugir tú at skapa íblástur og trivna hjá tínum starvsfólki?

Um hetta passar til tín persón, so kunnu vit bjóða tær eitt avbjóðandi starv við einum dynamiskum gerandisdegi í okkara spennandi spedition – og shippingfyritøku.

Smyril Blue Water setur trivnaðin hjá starvsfólkunum høgt og samstarv er grundarlagið í okkara gerandisdegi. Tú verður leiðari hjá 16 dugnaligum starvsfólkum.

Vit ynskja, at tú hevur leiðsluroyndir, at tú dugir at brúka tínar persónligu eginleikar og royndir til at seta ting í verk, og at fylgja upp uppá tey.

**Høvuðsuppgávurnar eru m.a.:**
- Framhaldandi menning av farmaleiðini ímillum Føroyar og Europa
- At Smyril Blue Water gerst eitt spennandi og dynamiskt arbeiðspláss
- At hava ábyrgdina av dagliga rakstrinum á skrivstovuni
- At luttaka í sølufremjandi messum og tiltøkum
- At umsita rakstrarætlan og enda rokniskap

**Vit bjóða:**
- Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv
- Luttøku í leiðslubólkinum, har víst verður til stjóran í fyritøkuni
- Fakligar og persónligar avbjóðingar
- Góðar starvstreytir og aðrar ágóðar
- Fríðan bil

Starvið verður at seta skjótast tilber.
Umsøknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 21.04.2008.

Umsøknin skal sendast til:

Smyril Line pf.
J. Broncksgøta 37
FO-110 Tórshavn

Att: Andras Róin

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Bent Rasmussen, stjóra, á +45 40702156 ella teldupostadressu: bra@sbwcargo.dk.

*Smyril Blue Water bleiv í 2005 stovnað sum eitt joint venture ímillum Smyril Line og Blue Water; felagið hevur høvuðssætið í Tórshavn. Umframt skrivstovuna í Tórshavn, hevur felagið skrivstovu í Hanstholm og á Seyðisfirði í Íslandi.*

Smyril Blue Water I www.smyrilbluewater.fo I tlf. 309 600




## Frítíðarskúlin opin í summarfrítíðini

**Børn í Tórshavnar Kommunu, sum nú ganga í 1. flokki, sleppa nú eisini í frítíðarskúla í summarfrítíðini**

BØRN OG UNG

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Børnini í Havn sleppa í Frítíðarskúlan í Hoyvík í summarfrítíðini, um tørvur er á tí. Tað er eftir áheitan frá fleiri foreldrum, at kommunan nú, fyri fyrstu ferð, eisini bjóðar ansing í vikunum 27, 28 og 29.

- Vit eru vorðin samd um, at tørvurin kanska er størstur í Hoyvík, tí her eru so nógvar barnafamiljur. Tískil er tað okkara frítíðarskúli, sum verður opin, sigur Levi Mørk, leiðari í frítíðarskúlanum í Hoyvík. Hann vísir eisini á, at karmarnir hjá teimum eru góðir, og at tey eitt nú hava fingið ítróttarhøllina í Hoyvík til endamálið.

- Vit koma at hava opið millum kl. 8 og 17, og longu nú hava fleiri tikið av hesum tilboði, sum ikki kostar foreldrunum nakað eyka, sigur Levi Mørk.

Sagt verður eisini, at børn frá øðrum frítíðarskúlum í Tórshavnar Kommunu, kunnu boða frá hjá tí frítíðarskúla har børn teirra ganga, tí bæði børn og starvsfólk úr allari kommununi verða knýtt at stovninum í Hoyvík hesar vikurnar.

## Nú er skeltið flutt

**Hóast foreldur á Velbastað klagaði til kommununa í trý ár, hendi onki fyrr enn Sosialurin kom uppí leikin. Nú er bygdaskeltið endiliga flutt og rulluportrið tikið burtur, so børnini kunnu ferðast tryggari í ferðsluni**


*Nú er skeltið flutt og rulluportrið tikið burtur, so skúlaleiðin hjá børnunum er vorðin tryggari – men enn einaferð kunnu vit staðfesta, at ofta hendir onki, fyrr enn miðlarnir koma uppí leikin.*

FERÐSLA

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Tað kemur í heilum fyri, at vanligir borgarar koma ikki ígjøgnum til myndugleikarnar við klagum sínum. Ikki fyrrenn miðlarnir koma uppí leikin henda broytingar. Hetta var eisini galdandi, tá fólk av Velbastað og úr Kirkjubø uppí saman gjørdu vart við ótryggu ferðsluviðurskiftini omanfyri bygdina.

Um miðjan februar skrivaðu vit grein undir heitinum: Skúlabørn í deyðsfellu á Velbastað. Í undiryvirskriftini stóð: *Við 80 km/t strúka bilarnir framvið smáu skúlabørnunum, sum skulu yvir um vegin.*

*- Vit spyrja okkum sjálvi, hvør okkara eigur fyrsta barnið, sum liggur undir einum bili, sigur Brynhild Høgnadóttir, óttafull mamma og limur í staðbundnu nevndini.*

Í greinini varð víst á, at hóast staðbundna nevndin hevði gjørt vart við trupulleikan í trý ár, hendi onki. Børnini, sum skuldu í frítíðarskúla, máttu yvirum ein landsveg, umframt at tey noyddust at stríða seg yvirum eitt gamalt rulliportur á landsvegnum. Tað einasta Tórshavnar Kommuna skuldi gera, var at flyta bygdaskeltið, so tað kom at standa soleiðis, at bilar á veg inn á bygt øki kundu lækka ferðina í góðari tíð. Nú er hetta hent, og vit kunnu enn einaferð staðfesta, at tíverri hendir ofta onki, fyrr enn miðlarnir koma uppí leikin.